**Fiskimálaráðið**
*Fiskiveiðieftirlitið*

# Maskinstjórar til Fiskiveiðieftirlitið

Tvey størv sum maskinstjóri við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum verða hervið lýst leys til setan skjótast gjørligt.

**Størvini fevna m. a. um hesar uppgávur:**
- Dagligu ábyrgdina av rakstri og viðlíkahaldi av øllum útbúnaði í maskinrúmunum og rúmum, sum beinleiðis hava samband við maskinrúm, umframt rúm har maskinútbúnaður er
- Dagligu ábyrgdina av viðlíkahaldi av øllum dekksmaskinum so sum spølum, kranum og davitum
- Dagligu ábyrgdina av viðlíkahaldsskipanum
- Annað fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði

**Førleikakrøv:**
- Vinnubræv sum Skipsmaskinstjóri *(STCW-regl. III/2 as Chief Engineer)*
- Heilsuváttan fyri sjófólk
- Leiðsluroyndir
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa

**Setanartreytir:**
Størvini eru tænastumannastørv og lønt í 31. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheiti er maskinstjóri.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum, vinnubrævi og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 19. juni 2003 kl. 12.00.

Umsóknirnar skulu sendast til :

**Fiskiveiðieftirlitið**
postsmoga 347
110 Tórshavn.

*Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Elmar Højgaard, deildarstjóra.*

**Fiskimálaráðið**
*Fiskiveiðieftirlitið*

# 2. meistarar til Fiskiveiðieftirlitið

Trý størv sum 2. meistarar við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verða hervið lýst leys til setan sum skjótast.

**Størvini fevna m. a. um hesar uppgávur:**
- Vaktgangandi maskinmaður sambært ásetingunum frá maskinstjóra
- Luttaka í dagliga arbeiðinum í maskinrúmunum, og rúmum sum beinleiðis hava samband við maskinrúm, umframt rúm har maskinútbúnaður er
- Luttaka í dagliga viðlíkahaldinum sambært viðlíkahaldsskipan
- Annað fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði

**Førleikakrøv:**
- Vinnubræv sum Skipsmaskinmeistari á 1. stigi *(STCW-regl. III/2 as 2nd Engineer)* ella vinnubræv sum Skipsmaskinistur á 2. stigi (*STCW-regl. III/1 as Watchkeeping Officer)*
- Heilsuváttan fyri sjómenn
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa

**Setanartreytir:**
Størvini eru tænastumannastørv og lønt í 24. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheiti er 2. meistari.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipa til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum, vinnubrævi og møguligum viðmælum, skulu verða Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 19. juni 2003 kl. 12.00.

Umsóknirnar skulu sendast til :

**Fiskiveiðieftirlitið**
postsmoga 347
110 Tórshavn.

*Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Elmar Højgaard, deildarstjóra.*

# Postur í tonsatali ávegis

**Eingin postur er komin til Føroyar síðan 21. mai, og hann hevur hópað seg upp í Danmark. Nú kemur alt í einum. 13 bingjur av skipsposti og 16 tons av flogposti**

POSTUR
*Stefan í Skorini*

Postmenninir hava nakrar strævnar dagar fyri frammman. Allur posturin, sum hevur hópað seg upp í Danmark, skal í komandi viku berast út, og tað er ein stór rúgva, sum er ávegis.

Postverkið hevur kunnað flutt post sum vant síðan týsdagin, tá fakfeløgini tóku blokaduna móti posti av. Nú ræður um at fáa allan postin til landið sum skjótast.

– Nú seta vit fulla kraft á at fáa allan postin til Føroyar og borið hann út sum skjótast, sigur Bergur í Garði, stjóri á Postverki Føroya.

Postverkið hevur ikki beinleiðis verið rakt av verkfallinum, men fakfeløgini hava blokerað flutningin av posti á flogvøllinum í Vágunum, og tí er eingin postur komin til landið síðan 21. mai. Orsøkin til blokaduna var, at fakfeløgini vildu vera við, at farmur varð fluttur við postverkinum.

– Vit kundu ikki veita Post Danmkark trygd fyri, at vit kundu taka ímóti og bera post víðari, so leingi blokada var á flogvøllinum, og tí gjørdi Post Danmark av at steðga flutninginum til Føroyar, sigur Bergur í Garði.

## Sera óheppið

Nú er posturin á veg, og nakað er longu komið til landið. Starvsfólkið á posthúsinum fer at arbeiða um halguna, so at allur posturin kann fáast til posthúsið í Havn.

Fyrsti útberingardagur er týsdagin, og tá kunnu føroyingar vænta sær gomul brøv úr útheiminum.

– Hetta hevur verið ein ómetaliga óheppin støða fyri okkum, sigur Bergur í Garði og leggur afturat, at onkur kann vera komin illa fyri av hesum, tí týdningarmikil brøv og pakkar eru óivað í postinum, sum hevur ligið í Danmark í so nógvar vikur.

Postverkið fer nú at kanna, hvussu posturin skjótast kann fáast til landið. Tað er avmarkað, hvussu nógv kann sendast við flogfari, og tí verður ein stórur partur sendur við skipið, men Bergur í Garði leggur doyðin á, at posturin skal til landið sum skjótast.



*Postur til Føroya hevur hópað seg upp í Danmark, og nú kemur alt í einum. Postmenn og starvsfólk á Postverkinum fáa úr at gera komandi dagarnar*

*Savnsmynd*




**HANDILSLÆRLINGUR TIL ÍTRÓTTARHANDIL**

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara at byrja skjótast tilber.
Starvið er fjølbroytt, spennandi og áhugavert fyri tann ið dámar væl at umgangast viðskiftafólk.
Tað er eisini møguleiki fyri at luttaka á ítróttarmessu í Danmark.

Lærutíðin við HH er 2 ár, og við FHS 3 ár. Í hesum tíðarskeiðnum skal næmingurin á skúla í Danmark 3 ferðir.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur

Um tú ert tann rætti kunnu við bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum, samstundis sum møguleiki er fyri at halda fram í fyritøkuni eftir lokna lærutíð

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

**P/f Thomas Dam Ítróttur**
**Postmoga 268**
**FO-110 Tórshavn**

Sosialurin 341800

**P/F THOMAS DAM**
ÍTRÓTTUR • N. Finsensgøta 5 • Postsmoga 268 • 110 Tórshavn
Tel. 355 300 • E-mail: sportthd@post.olivant.fo



Lærer for livet

Haslev Seminarium



**Læraraútbúgving?**
**So er Haslev Seminarium tín møguleiki**

Haslev, sum er ein lestrarbýur burtur av, liggur á Suðursælandi og er umgyrdur av vøkrum náttúruumhvørvi. Í býnum 10.000 fólk.

Á skúlanum ganga í løtuni 10 føroyingar, so møguleikin fyri at tosa føroyskt og at eta føroyskan mat er til staðar. Í hesum sambandi er jólaveitslan ein fastur táttur.

Í fyrisitingini eru eisini fólk, sum tosa og skilja føroyskt. Stjórin, Sverri Hammer, er hálvur føroyingur og Ulla Juul, sum m. a. tekur sær av bókasavninum (danski stuðulin til lesandi, sum eisini føroyingar fáa ágóðan av) tosar føroyskt.

Haslev Seminarium udbyder 18 ud af folkeskolens 19 fag. Kun sløjd udbydes ikke.

Klik ind på vores hjemmeside og lær os at kende
**www.HaslevSeminarium.dk**

**Tilmeldingsfrist 1. juli 2003**

**Haslev Seminarium**
**Søndergade 12 - 4690 Haslev**
**Tlf. 56 37 37 37 - Fax 56 37 37 38**

**www.HaslevSeminarium.dk**


veitst tú ikki tað?

# Mylnuhúsið

**søkir eftir 2 pedagogum.**

Søkt verður eftir 2 pedagogum, at byrja uml. 15. august 2003.

Mylnuhúsið er ein sjálvsognarstovnur frá 1999. Vit taka dagliga ímóti 120 børnum í aldrinum 0 - 9 ár. Í Mylnuhúsinum er pláss fyri at bæði børn og vaksin kunnu seta síni *spor* her, vit arbeiða í tí dagliga við okkara eygleiðingarevnum og eru upptikin av, hvat upptekur børnini, fyri síðan at leggja dagin til rættis út frá tí og leggja vit stóran dent á, at varða um øll børnini.

Vit sóknast tí eftir fólki, ið er:
- fleksibul
- hevur opið sinni
- sær møguleikar fram um mørk
- tekur støði í barninum
- tekur barnið í álvara
- er opin fyri nýhugsan
- leggur stóran dent á gott samstarv við foreldur og samstarvsfelagar.

Lønar- og setunarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið, kommunurnar og Føroya Pedagogfelag.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðaran, Honnu Thøgersen, telefon 457788/ 217789 ella Annie Joensen telefon 217788.

Um ongin pedagogur søkir, verða hjálparfólk sett ístaðin.

Umsóknir til størvini, saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu verða okkum í hendi, seinasta lagið mánadagin 23. juni 2003.

**Mylnuhúsið**
Mylnugøta 10
700 Klaksvík

# HMP-Consult

Søkir verkfrøðing og byggifrøðing

**Virkisøkið hjá verkfrøðinginum verður:**
- projektering av bygningum
- berandi konstruktiónir
- vegagerð og anleggsarbeiði.
- eftirlitsuppgávur

**Virkisøkið hjá byggifrøðingurin verður:**
- projektering av bygningum
- vegagerð og anleggsarbeiði.
- eftirlitsuppgávur

Til projekteringina nýta vit m.a. telduforritini AutoCAD og NovaPoint

Hevur hettar tín áhuga, so send okkum eina umsókn við CV.
Seinasta freist at søkja er t. 18. juni 2003.

Meira fæst at vita við at venda sær til Una ella Hans.

**HMP Consult Sp/f, ráðg. verkfrøðingar**
Óluvugøta 12, Fo-100 Tórshavn
Tel. 31 22 79
e-mail: hmp@hmp-consult.com

# Pedagogur og/ella hjálparfólk og reingerðarfólk

## til Frítíðarskúlan í Stoffalág 82

**Størvini:** eru eitt pedagogstarv uppá 30 t. og tvey hjálparfólkastørv uppá 30 t. og 25 t. Reingerðarstørvini eru 2 t. at vaska ovaru hædd og 2 t. at vaska niðaru hædd.

**Stovnslýsing:** Á Frítíðarskúlanum í Stoffalág 82, ganga 67 børn. 46 ganga fyrrapart og 21 ganga seinrapart.

**Tað er týdningarmikið,** at tit hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing, áliti og umsorgan fyri tí einstaka barninum og eitt gott samstarv millum foreldur og starvsfólk. Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt, er røkin og førur fyri at taka avgerðir í arbeiðinum.

**Vit leggja stóran dent á,** at vit eru eitt frítíðartilboð til børnini. Vit eru saman við børnunum í teirra frítíð. Vit vilja skapa møguleika fyri, at børnini mennast við at lurta, práta og vera saman við teimum.

**Setanarviðurskifti:** Størvini verða sett tann 06. august 2003, løn sambært sáttmála ímillum Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Føroya Pedagogfelag.
Um pedagogur ikki søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Umsókn saman við viðmælum, upplýsing um útbúgving og royndum skulu vera Frítíðarskúlanum í hendi seinast 16. juni 2003. Umsóknirnar skulu sendast til:

**Frítíðarskúlan í Stoffalág 82**
**100 Tórshavn**

Setanarsamrøður verða skjótast gjørligt eftir hetta.

Meira fæst at vita um størivni við at venda sær til: Barbaru Dahl, leiðara og Bjørg Danielsen, varaleiðara á tlf. 314879.

# Haldórsvíkar Skúli

Søkt verður eftir lærarum til Haldórsvíkar Skúla skúlaárið 2003/2004.

**1 starv við fullum tímatali fyri lærara í farloyvi**
**1 starv 6 t/v vegna avlopstímar.**

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlaleiðaran á tlf. 423159.

Møguligar umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 20. juni 2003.

**Haldórsvíkar Skúlastýri**
v/ Martin Hansen
438 Langasandur